sosialurin telf. 14720 . 11820 . giro 6282725
box 76. 3800 Tórshavn
Útgevari: Føroya Javnaðarflokkur
Blaðstjóri: Vilhelm Johannesen (ábyrgd) telf. 56411
Blaðmenn: Høgni Djurhuus

Uppseting: Sosialurin
Prent: Dimmalætting

Stevnur og fráhaldsrørsla

FØROYAR hava eisini í summar nógv vitjandi og tey eru komin úr ymsum ættum og við ymsum ætlanum. Tey eru komin at vitja skyldfólk og kenningar og ein partur er eisini komin fyri í Føroyum at leita saman til ráða. Ráðstevnurnar eru vorðnar fleiri sum nú verða lagdar í Føroyum

HETTA SIGUR okkum so mikið sum tað, at vit eiga í framtíðini at brynja okkum út til at taka ímóti fremmandafólkinum. Vit eiga ikki bert at koma við glepsan móti teimum, sum vilja leggja so tilrættis, at vit kunnu taka ímóti fremmandafólki, hvørki teimum, sum vilja byggja gistingarhúsini ella gera aðrar umstøður til móttøku av fremmandum.

EIN AV hesum stevnum, sum Føroyar av fyrstan tíð hevur hýst, er Norðurlanda fráhaldsstevnan, sum hildin verður triðja hvørt ár í einum av norðurlondunum. Á hesi stevnu vóru umboð frá fráhaldsfelagsskapum o.ø. og vóru har fyrilestrar og tjakevni, sum gav holla lýsan av umstøðunum í samband við rúsdrekkanýtslu.

HAR VAR fólk, sum dagliga hevur inn at sær tey, sum eru niðurundirkomin av ovurdrykkju, læknar sum leikfólk, og tú fekst vitan um viðurskifti, sum kunnu hava týdning í fráhaldsarbeiðinum í Føroyum og annars hjá fólki, sum skal taka sær av viðurskiftum í samband við rúsdrekkavandamálið.

VIT META tað av stórtýdningi, at slík stevna hevur verið hildin í Føroyum. Fráhaldsrørslan eigur tøkk fyri, at hon gjørdi hetta tiltak, sum eisini er eitt lið í 100 ára hátíðarhaldi rørslunnar í Føroyum.

MEN FRÁHALDSRØRSLAN átti at latið hesar stevnufundir verið opnar fyri fleiri enn blaðmonnum og fráhaldsfólki, tí har vóru fyrilestrar, sum høvdu áhuga langt út í samfelagið.

Á 100 ÁRA degi fráhaldsrørslunnar halda vit annars at postverkið eigur at minnast hesa rørslu við frímerkjaútgávu. Ein av stovnarum fráhaldsfelagsins fyri 100 árum síðani var postmeistarin C. C. Danielsen.

dagbókin

Gudstænastur sunnudagin

við altargangi í Vesturkirkjuni: Høgni Poulsen. **Kirkjubø** vi altargangi: Kjartan Mørkøre. **Glyvrum** kl. 11: J. Follend. **Eiði** kl. 11: P. M. Rasmussen. **Dalur** kl. 12: Bergur Jacobsen. **Hvalba** kl. 10,45 og **Sandvík** kl. 12,15: Breiner Henriksen og Elsa Funding. **Hovi** kl. 12 og **Fámjin** kl. 19: J. Weihe. **Havnar kirkja: Bjarni** Bæk. **Hvítanes** kl. 11: E. Vilhelm. **Klaksvík** við altargangi: J. Magnussen. **Svínoy** við altargangi: S. J. Joensen. **Hvannasund:** Jóhan Nielsen.

Missiónshúsið á Tvøroyri

Møti sunnukvøldið kl. 19.

Missiónshúsið við Landavegin

Á møtinum sunnukvøldið talar Bent Jørgen Bendix frá Norea Radio og greiðir frá radiomissiónini.

Adventista-samkoman

Í Ítróttarhøllini í kvøld kl. 20 stór sangskr.

Norea Radio

Bent Jørgen Bendix frá Norea Radio talar og greiðir frá radiomissiónini í missiónshúsinum á Toftum í kvøld kl. 20.

Evangeliska røddin

hoyrist hvørt mánakvøld kl. 9 frá Monte Carlo (við síðuna av Luxemburg) á millumbylgju 205 metrum (1466 kHz). Sendingin varir eitt korter.

Brúdleyp

Í dag giftast í Esbjerg Lone Brock, Esbjerg og Heini Høghamar av Eiði. Adr.: Rosenvængets Allé 59, 6700 Esbjerg.

Skúlaembætisprógv

Við Københavns Universitet hevur Birta Jacobsen úr Klaksvík tikið prógv sum cand. mag. í fronskum og samfelagsfrøði.

Frelsunarherurin

Møti sunnukvøldið kl. 20.

Blákrosslegan

verður á Viðareiði í døgunum 10.—14. august. Øll yvir 14 ár kunnu vera við og eiga at tekna seg innan 26. juli hjá Johs. Álvheygg.

Hattarvík

Møti verður í Hattarvík í kvøld og sunnukvøldið kl. 20. Trúboðararnir Martin Hammer og Niels Smith tala.

Svínoy

Trúboðaranir Martin Hammer og Niels Smith hava møtir í Svínoy mánakvøldið, týskvøldið og mikukvøldið kl. 20.

Bátar

Úr Noreg kunnu vit útvega jollur, sportsbátar og fiskibátar úr træ og glasfipur, 8—19 fót.
Skjót levering, lágir prísir.
Telf. 32379

ÓLAVSØKUTILBOÐ

Stórt úrval av plyss **bilseturbetrekkum** í nógvum litum

Bert 450,— fyri settið

MÁLINGAHANDILIN
GÓLV- OG TEPPIDEILDIN - TLF. 14393

BILAR ★ BILAR ★ BILAR ★ BILAR ★ BILAR ★ BILAR ★ BILAR ★ BILAR ★ BILAR ★ BILAR ★ BILAR ★ BILAR ★ BILAR ★ BILAR

VAUXHALL OPEL GM

Sjálvandi keypa vit bilin frá

Pf. Vilhelm Nielsen & Søn
tlf. 11140

Fleiri modell á goymslu